# VEÐRIÐ Í LAMBA



# NOVEMBER 2022

# VEÐURSTOVA FØROYA

**<u>Dagfesting</u>**: 16. november 2022

**<u>Staður</u>**: Faktorsvegur 14 – 700 Klakvík

**<u>Heimildarmaður</u>**: Jón Nónklett, bóndi og sjómaður

**<u>Viðtal við</u>**: Hanus Kjølbro

# Lamba

Lamba er bygd í Eysturoy – bygd á eitt eiði, sum strekkir seg eystur og vestur úr Lambavík í eystri ímóti Skálafjørðinum í vestri.

Norðureftir og suðureftir eru fjøll, norðureftir høg fjøll og suðueftir lægri fjøll.

Norðanfyri er Stórafjall (568), í landnyrðing er Lambaregn (475m) og millum hesi fjøll er Lambaskarð, í vanligari talu Skarðið (371m)

Suðureftir er Hæddin 267m)




Mynd 1: Kort av sunnara parti av Eysturoy. Pílarnir peika ímóti Lamba.

# Veðrið í Lamba

Veðrið í Lamba er tengt at ættini, líkasum tað er alla aðrastaðni í Føroyum.

Millum manna verður sagt, at tað eru bara tvær ættir í Lamba, annaðhvørt liggur hann inneftir (*av eystri*) ella heimeftir (*av vestri*).

Men soleiðis er sjálvandi ikki, og tað er stór variatión í bæði megi, og hvussu ættin rakar ymsastaðni í bygdini.

Men lendið ger, at fleiri ættir snara sær soleiðis, at tá tað ikki er nógvur vindur, liggja tær annaðhvørt inn eftir víkini ella úteftir.

Lamba liggur á fótablaðnum á Stórafjalli fyri norðan, og tískil eru serliga høgættirnar góðar. Norðan er at kalla stilli í øllum veðri, og tað kann birtast kertuljós úti, hóast tað er stormur og skaðaveður aðrastaðni.

Tískil kann eisini leggjast nógvur kavi á høgætt. Tað er lívd og kavar beint niður og skalvar leggjast allan vegin frá Stórafjalli og út í Líð.

Á sjálvum Skarðinum er nógvur vindur á høgætt, og tað kann verða ringt at fóta sær. Skarðið er smalt, og tá alt verður trýst saman og fer upp um Skarðið, kann vera vindur av ódnarmegi har, hóast tað er nógv minni miðalvindur aðrastaðni í landinum.

Eysturættirnar eru tær, ið ávirka lambafólk mest og eru skaðaættirnar á sjónum og óttin hjá teimum, sum eiga bát og neyst. Eystur í hav er opið, og tískil roynist illa til kyrru millum landnyrðing og sunnan.

Eysturættin er køld um veturin, tá vit fáa vind úr Russlandi og har um leiðir, og hon fer inn á bein og gjøgnum møn og merg. Um summarið hevur hon slavna luft við sær uttan av havi og aloftast við mjørka og er óbrúkilig til hoyterra.

Hóast tað ikki er so høgt uppfyri suðureftir, so roynist tað væl til veður, tá ið hann kemur lágt.

Fyri vestan er Skálafjørðurin, og tað er haðani skaðaættirnar til vind eru.

Fyri at fáa meiri at vita um veðrið í Lamba á teimum ymsu ættunum, setti undirritaði seg í samband við Jón Nónklett (**JN**). Hann er úr Lamba og av bóndaætt. Var sjómaður í nøkur ár, sigldi við m.a. farmaskipi, trolara og línuskipi og er útlærdur skipsførari. Hann situr á festinum á fedranna garði í Lamba umframt einum øðrum festi Millum Fjarða.

Røktin av Eystursíðuni, festinum í Lamba krevur bát og langar túr til gongu og er tískil nær tengt at veðrinum.

Við til samrøðuna í fundarhølinum hjá Veðurstovu Føroya á Faktorsvegi 16 í Klaksvík hevði undirritaði spurnarblað til allar 16 ættirnar, ið vanliga eru umtalaðar í bygdini:

- Er vindurin javnur ella ójavnur á ættini
- Er meira vindur í ættini enn aðrasteðs – ella øvugt
- Er ættin vát – t.e. regn, tá ið turt er aðrastaðni – ella øvugt
- Er hetta mjørkaætt?
- Er ættin vanliga ein góð ætt ella ein ring ætt – ber til at siga tað við fáum orðum?
- Onnur viðurskifti um ættina, søgur, fyribrigdi, hendingar o.s.fr.

Spurt varð somu spurningarnar ætt fyri ætt. Byrjað varð við norðan, og var farið allan kringin runt eystureftir, og steðgað var við heil- og hálv- og millumættirnar.

Spurningar og svar og aðrar viðmerkingar síggjast aftast í hesum skjali.




*Mynd 2: Tær 32 ættirnar. Til samrøðuna eru ikki allar 32 ættirnar brúktar, men onnurhvør - t.e. heil-, hálv- og millumættirnar. Íalt 16 ættir.*

## Norðan

Norðan er góð ætt í Lamba. Lítil ella eingin vindur.

Vanliga er nógv minni vindur í Lamba enn aðrastaðni í landinum á norðurætt.

Norðan er turr ætt í Lamba. Tó kann nógvur kavi leggjast á norðurætt.

Tað er so at siga ongantíð mjørki á norði.

## Landnyrðingur norðan

Veðrið í Lamba á landnyrðingi norði er tað sama sum á norði.

## Landnyrðingur

Landnyrðingur er miðalgóð ætt í Lamba.

Vindurin av landnyrðingi er javnur í Lamba og er líkasum miðal fyri landið upp í 15 m/s. Fer hann upp um tað, kann tað koma sum úr byrsumúla hjá teimum, sum búgva undir Lyngbrekku.

Vanliga er landnyrðingur turrur í Lamba. Mjørki kann leggja seg í erva á landnyrðingi.

## Landnyrðingur eystan

Landnyrðingur eystan er ikki nøkur ring ætt í Lamba.

Vindurin er javnur, vindferðin eitt sindur meiri enn sagt fyri landið.

Tá ið tað kemur til avfall, er landnyrðingur eystan líka sum miðal fyri restina av landinum – t.e. ikki turrari ella vátari enn aðrastaðni, líkist øllum øðrum.

Mjørkaættirnar í Lamba eru frá landnyrðingi eystri og niðureftir. Longur niður ættin, verri er við mjørka. Blívur vekk á landsynningi suðuri ella suðuri.

## Eystan

Eystan er ein køld og trá ætt í Lamba.



Vindurin á eysturætt er so javnur, sum hann kann vera. Einki ber uppfyri.

Vindferðin er vanliga eitt sindur meiri á eystri enn miðal fyri landið.

Eystan er ein vát ætt í Lamba og eisini mjørkaætt.

## Landsynningur eystan

Veðrið í Lamba á landsynningi eysti er tað sama sum á eystri.

## Landsynningur

Landsynningur er ikki ein góð ætt í Lamba – ringasta brimætt.

Vindurin er javnur, vindferðin tann sama sum miðalvindferðin fyri landið.

Landsynningur er ein vát ætt í Lamba og eisini mjørkaætt.

## Landsynningur sunnan

Tað er ójavnt, hvussu landsynningur sunnan roynist í Lamba.



Vindurin er javnur, vindferðin tann sama sum miðalvindferðin fyri landið.

Landsynningur sunnan er vát ætt í Lamba og eisini mjørkaætt.

Í áttatiárunum vóru bæði Lyngbrekku- og Fløtabáturin skræddir úr neystunum av brimi. Harður streymur og landsynningur sunnan gjørdi, at brimið breyt neystahurðarnar inn á neystunumð sum standa ovarliga niðri á Heyggi

## Sunnan

Sunnan er góð ætt í Lamba.



Vindurin er javnur, vindferðin minni enn miðalvindferðin fyri landið.

Suðurættin er vát ætt í Lamba og mjørkaætt eisini. Tó ikki so nógv sum eystan og landsynningur. Pollamjørki, sum hvørvur, tá ið sólin kemur fram.

## Útsynningur sunnan

Útsynningur sunnan er ein góð ætt, tá ið tað kemur til vind.

Á útsynningi suðuri er javnur vindur, vindferðin eitt sindur minni enn miðalvindferðin fyri alt landið.

Ættin er ikki altíð vát í Lamba. Vanliga er ælaveður á ættini. Á útsynningi suðuri er ikki mjørki í Lamba.

## Útsynningur

Útsynningur er ein miðal góð ætt í Lamba, tó keðilig ovarlaga í bygdini. Ættin er tann ættin í Lamba, sum líkist mest almennu forsagnunum fyri veðrið.

Vindurin er javnur, tó kunnu tey fáa hvirlur í Dalinum, tá ið  vindurin er nógvur. Hann kemur upp um Akslaklettar og fær ferð omanav aftur. Ovarlaga í bygdini er meira vindur á útsynningi, har hann gongur fríur av Saltnesi heilt vestur undir Síðu.

Á útsynningi kann vera ælaveður, ikki samregn – og ættin er ikki mjørkaætt.

## Útsynningur vestan

Útsynningur vestan er ringasta ætt í Lamba.

Vindurin er ójavnur – rakar fleiri ferðir og á báðum síðum, so hvørt sum hann fer heimeftir gjøgnum bygdina. Í ringum veðri er meira vindur enn miðalvindferðin er fyri landið.

Útsynningur vestan er ikki ein vát ætt í Lamba, men er sum sagt fyri landið. Heldur ikki mjørkaætt.



## Vestan

Vestan er ikki góð ætt í Lamba. Kann vera nógvur vindur um veturin, men sjáldan liggur hann leingi. Góð terraætt um summarið. Setur væl av, tá ið lotið ligur heim gjøgnum bygdina.

Vindurin er javnur, og vindferðin er nógv meiri enn miðalvindferðin fyri landið.

Vesturættin er ikki ein vát ætt í Lamba, heldur ikki mjørkaætt.

## Útnyrðingur vestan

Veðrið í Lamba á útnyrðingi vestri er nakað tað sama sum á vestri.

## Útnyrðingur

Útnyrðingur er góð ætt í Lamba.



Vindurin er javnur, vindferðin er minni enn miðalvindferðin fyri landið.

Ættin er ikki vát í Lamba, men kavi legst á útnyrðingi.

## Útnyrðingur norðan

Útnyrðingur norðan er góð ætt í Lamba.

Vindurin er javnur, men tá ið hann er nógvur, fær hann ferð á oman av Skarðinum og rakar húsini á Kinn við nógvari megi. Vindferðin er minni enn miðalvindferðin fyri landið.

Ættin er turr um summarið, men kavi kann leggjast um veturin. Útnyrðingur norðan er ikki mjørkaætt.